# Skjúttarnir miða høgt




*Teir fimm dúgvuskjúttarnir hava fyri tað mesta tikið sær av løttum, tí banin, teir skulu skjóta á, var ikki liðugur, tá teir komu til Rhodos*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fullkomin konsentratión og eginleikin at vera ísakaldur í avgerandi løtunum, er uppskriftin upp á eitt gott úrslit, siga skjúttarnir úr Føroyum, sum hava verið rættiliga óhepnir í sínum fyrireikingum**

**SKJÓTING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðani seinastu leikir, er eitt sindur av útskifting gjørd millum føroysku skjúttarnar. Hetta broytir tó einki upp á málini, sum eru rímiliga høg. Bronsu heiðursmerkið frá 2005 skal endurvinnast, umframt at teir eisini ætla at bøta um hini úrslitini, har tað næstbesta tá var eitt 13. pláss.

Tískil hava skjúttarnir eisini vant ógvuliga miðvíst uppundir leikirnar. Serliga teir seinastu tvær vikurnar hava teir av álvara kýtt seg. Tí kom tað sera illa við hjá teimum, at teir millum lítið og einki hava kunnað vant, tí banin teir skuldu kappast á, als ikki var liðugur, tá teir komu til Rhodos mánakvøldið.

– Fyri at liggja millum teir fremstu, mást tú vera neyvur, og fyri at gerast neyvur, er neyðugt við nógvari og miðvísari venjing. Tí er tað rættiliga óheppið hjá okkum, at vit ikki kunnu skjóta nakrastaðni her, sigur Marius Joensen, sum eins og allir hinir skjúttarnir er úr Sunda Byrsufelag.

Hann greiðir frá, at teir høvdu ætlað at vant beinanvegin sum teir komu til Rhodos, og annars venja nakað hvønn dag, soleiðis at alt varð hildið viðlíka til mánamorgunin, tá teir byrja sína kapping.

– Vistu vit av trupulleikanum, høvdu vit verið heima í Føroyum og vant við fullari ferð, og so heldur komi niður nakað seinni, sigur Marius Joensen.

## Mistu ein mánað

Tað er tó ikki bara á Rhodos, at skjúttarnir hava verið óhepnir og ongan bana havt at vant á. Allan maimánað hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan stongt teirra bana við Norðskála, tí tey skuldu góðkenna hann. Skjúttarnir eru samdir um, at tað var rættiliga keðiligt, at teirra bani varð læstur í ein mánað so tætt upp undir leikirnar.

Men skjúttarnir hava ikki bara verið óhepnir, tí í mun til aðrar ítróttargreinar kemur veðrið neyvan at ávirka á sama hátt hjá teimum.

– Sjálvandi ávirkar sólin og hitin eisini okkum, men samanbera vit við aðrar ítróttargreinar, eru vit rímiliga væl stillaðir, tá vit nú ikki flyta okkum heilt so nógv sum tey, ið skulu renna hálvt marathon ella okkurt líknandi, sigur Robert Hansen, skjútti, og vísir á, at hjá teimum eru tað aðrir eginleikar, sum gera seg galdandi.

## Knappur og kvikur

– Tað ræður um at vera knappur, kvikur og at hava refleksini í ordan, staðfestir Marius Joensen. Tað er nevniliga so, at dúgvurnar, skjúttarnir skjóta, verða skotnar úr maskinunum við umleið 120 km/t. Dúgvan flýgur 65 metur og trý sekund eftir, at hon er skotin út, er hon uttanfyri skotsmála. Tí skal berast skjótt at.

Hetta er tó bara galdandi fyri teir sonevndu dúgvuskjúttarnar. Øðrvísi treytir eru galdandi hjá teimum, sum skjóta riflu. Millum teirra er ein føroyingur, og tað er fyrstu ferð í oyggjaleikahøpi, at føroyingar luttaka í hesi grein.

Hesin hevur tó tað til felags við hinar skjúttarnar, at fullkomin konsentratión og eginleikin at vera ísakaldur í avgerandi løtunum, er uppskriftin upp á eitt gott úrslit.



**Vit stuðla eisini tær...**

Við eini ferðatrygging í rygginum kunnu tú og familjan fáa endurgjald og hjálp á staðnum, um tit verða sjúk ella skadd á ferðini.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari